# Fyrstur við tí seinasta

## 5 ferðir um vikuna

Tekna teg sum haldara nú, so fært tú Sosialin **ókeypis** restina av hesum ársfjórðinginum


Sosialurin

Nr. 96 • týsdagur • 22. mai 2001 • 75. árgangur • Kr. 10,00

www.sosialurin.fo

Dansurin gekk so lystiliga í Havn

síða 4

Arbeiðsleysur:

Jákup er liðugur í Herfølge

Ítróttur, s. 13–28

# Ja!

## Sjálvandi vil eg halda Sosialin

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ______________

Bústaður: ______________

Postnr.: ______________

Bygd/býur: ______________

Undirskrift: ______________

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn




# Pynta upp á rúsdrekkalógina



*Hóast Rúsdrekkalógin verður eitt sindur broytt, so verður tað framvegis hjá Rúsdrekkasølu landsins, at fólk mugu keypa teirra rúsdrekka.*

**Rúsdrekkasøla landsins skal hava minni vald í framtíðini. Við størri tiltøk og samkomur verður nú eisini møguligt at fáa skeinkiloyvi. Hetta er nakrar av teimum broytingunum, sum ætlanin er at gera í rúsdrekkalógini**

LÓG

*Heri á Rógvi*

Tað var hin 10. mars 1992, at lógin um rúsdrekka kom í gildi í Føroyum. Hetta lóg kollvendi tað føroyska samfelagið á tann hátt, at ein almenn rúsdrekkasøla varð sett á stovn. Hetta merkti minni at gera á posthúsunum, men samstundis eisini tað, at føroyingar kundu fáa til vega rúsdrekka uttan stórvegis hóvasták. Kring oyggjarnar stungu deildir hjá rúsdrekkasøluni seg upp.

Tað er eisini nógv skrivað og tosað, um hesa góðu rúsdrekkasølu, men hon tykist nú at vera ein natúrligur partur av landslagnum her í Føroyum. Vit hava eisini fingið skoykiloyvi ymsastaðni eftir nýggjari lóg, men heldur ikki her hevur alt gingið so friðarliga fyri seg.

### Broyting

Síðani rúsdrekkalógin sá dagsins ljós í 1992 er hon broytt tríggjar ferðir. Lógin er í sínari tíð gjørd eftir serligar norskari og svenskari fyrimynd. Rúsdrekkalógin er tó ikki ein heilt vanlig lóg, sum eitt stýri uttan víðari kann taka sær av. Rúsdrekkamál verða í løtuni umsitin av vinnumálastýrinum, men rúsdrekkalógin er ikki nøkur vinnulóg. Grein 1 í rúsdrekkalógini sigur: »Endamálið við hesari lóg miðar ímóti at avmarka rúsdrekkanýtsluna og minka sum mest um skaðan, sum rúdrekkamisnýtslan hevur við sær fyri einstaklingin og samfelagið, og til tess at røkka hesum endamáli at áseta reglur í sambandi við rúsdrekka í Føroyum.«

Tær broytingar, ið ætlanin er at seta í verk, er heldur ikki nakran kollveltandi broytingar av nøkrum slag. Talan er um seks ymiskar broytingar, sum fara at hava nakran stórvegis týdning, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum. Hann kallar broytingar fyri tekniskar broytingar.

### Loyvisnevndin

Sum nú er, so er tað Rúsdrekkasøla landsins, sum skal loyva bryggjaríunum at útflýggja egna framleiðslu av øli. Eisini kann Rúsdrekkasøla landsins taka aftur loyvi. Hetta skal eftir ætlan broytast í framtíðini. Tað verður í framtíðini loyvisnevndin, sum skal taka sær av hesum. Loyvisnenvndin er ikki nakað ókent fyribrigdi í tílíkum høpi. Uppgávan hjá loyvisnevndini er at veita skeinkiloyvi v.m. Tað skulu sita fimm limir í loyvisnevndini, og hesir umboð ymiskar stovnar og vinnufelag, sum hava ávíst tilknýti til virksemi, ið lógin umfatar.

### Eyka loyvi

Eitt, sum er nógv kritiserað viðvíkjandi rúsdrekkalógini, er, at til størri tiltøk, serliga har útlendskir gestir hava verið við, so hevur ikki verið møguligt at borðreiða við drekkivørum av tí sterkara slagnum, men hetta skal nú broytast.

Loyvisnevndin kann nú lata eykaloyvi til ymisk tiltøk. Hesi loyvini skulu helst latast til persónar, sum hava skeinki loyvi, men kunnu eisini latast øðrum, um hesir lúka treytirnar, ið eru settar fyri at fáa loyvini.





